


# Einstaklingur stóð fyri allari trygdini á nic.fo

Tíbetur fyri Føroyar, vóru allar dátur fluttar til London áðrenn teldusníkar yvirtóku nic.fo - var álopið hent áðrenn hevði verið heilt galið

GEORG L. PETERSEN | 2018-10-26 14:54

**Trygdin á nic.fo lá hjá einum einstaklingi í Føroyum, sum hevði bygt skipanina upp frá byrjan. Í 2016 ásannaði FO-ráðið at hetta var ikki nóg gott, men stutt áðrenn tey náddu at flyta skipanina endaliga varð hon álopin og yvirtikin av teldusníkum. Og var nic.fo álopin áðrenn øll dátuni vórðu flutt til Onglands, høvdu teldusníkarnir fingið fullkomið vald á øllum heimasíðunum, tí hon tá ikki kundi sløkkjast niður og byrja av nýggjum**

– Vit arbeiddu við flytingini áðrenn álopið varð framt og vóru í ferð við at flyta data til nýggju skipanina. Einasta orsøk til at vit kundu sløkkja 24. september var tí vit høvdu eitt komplett sett av data aðrastaðni. Annars høvdu vit ikki kunnað sløkt. Man kann siga, at álopið hendi eina viku ov tíðliga, tá alt hevði verið lagt um, sigur Mimi Steintórsdóttir, forkvinna í FO-ráðnum, sum hevur ábyrgdina av .fo navnaøkinum umvegis nic.fo.

Tað kundi endað heilt galið, tá teldusníkar lupu á og yvirtóku nic.fo sunnudagin 23. september. Hevði arbeiðið við at flyta skipanina ikki verið komið so langt, hevði verið vónleyst at sløkt skipanina, sum teldusníkarnir høvdu yvirtikið.

Áðrenn álopið var trygdin ikki tann besta og lá hjá einum einstaklingi í Føroyum.

– Tað var ein persónur í Føroyum sum hevði ábyrgdina áður, men tað var eisini orsøkin til, at vit valdu at skifta, tí tað var ov vandamikið, at skipanin var tengd at einum persóni. Nú er øðrvísi og trygdin verður dagliga dagførd, sigur forkvinnan í FO-ráðnum.

– Hetta var ikki ein føroysk skipan vit høvdu áðrenn, men ein open-source skipan, sum man hevði bygt víðari á, men hon var so tengd at einum einstøkum persóni, at eingin annar dugdi at brúka hana, leggur hon afturat.

Hesin einstaklingurin hevði snikkað skipanina saman, tá Føroyar yvirtóku navnaøkið. Fyrsta FO-adressan varð skrásett í 1995 og FO-ráðið varð sett á stovn í 2001.

– Vit hava sum nevnt arbeitt við eini broyting síðan 2016. Tað er ikki bara nakað man ger frá degi til dags. Vit leitaðu eftir, um nakar veitari í Føroyum gjørdi nakað tílíkt, men tað var tað ikki, sigur Mimi Steintórsdóttir.

## Stór fyritøka í London yvirtikið

– Umsitingin verður framvegis í Føroyum hjá Trygdartøkni og skipanin er framvegis í Føroyum hjá Elektron. Men maskinrúmið sjálvt fer at liggja hjá Centralnic í London, sum er ein altjóða veitari av tílíkum skipanum, sigur Mimi Steintórsdóttir, forkvinna í FO-ráðnum.

Hon sigur, at alt var klárt, kontraktir undirskrivaðar og so framvegis. Tað einasta sum manglaði var sjálv síðan, sum brúkarin opnar, umsetingar og annað. Tí bar til at steingja skipanina og síðan kanna eftir, hvussu stórur skaðin var.

– Vit kannaðu hana eitt ár aftur fyri at vita, um teldusníkarnir høvdu verið í skipanini í longri tíð. Men tað kundu vit ikki staðfesta við okkara fyribilskanningum. Men nú mugu vit síggja hvat løgreglan kemur fram til, sigur hon.

Vísir tað seg, at teir hava verið inni í longri tíð, so eru tað ikki persónsviðkvæmir upplýsingar sum teldusníkarnir hava havt atgongd til.

– Tað er eingir viðkvæmir upplýsingar í okkara skipan, tí teimum hava vit ikki brúk fyri. Vit hava í veruleikanum ikki brúk fyri einum navni, men bara hvør skal gjalda, sigur Mimi Steintórsdóttir.




# Ungir teldunørdar teir bestu at verja Føroyar móti teldusníkum

**Vit vita, at Føroyar nú eru kendar út útlandinum, men vit ána ikki hvussu nógv útlendskir teldusníkar kenna til okkum. Í ringast føri kann bæði vinna og almennar tænastur leggjast lamnar – KT-serfrøðingur mælir at seta eitt "Ráð fyri talgilda verju av Føroyum", sum kundi skipað fyri stýrdum álopum á allar skipanir í landinum – við hjálp frá ungum teldunørdum**

– Tað eru ikki slipsamenn, sum ganga til móttøku og drekka café-latte, sum vita hvussu ein teldusníkur hugsar ella hvørjir vandar eru á ferð. Tað eru hinvegin ungir teldunørdar, sum best dáma at eta pitsa, drekka kola og mangla eitt bað, sum sita inni við vitanini. Og teir eru besta vápnið, um vit veruliga skulu

tryggja Føroyar móti ógvusligum álopum uttanífrá, ið kunnu leggja bæði stór framleiðsluvirki, almannaverk, SEV, sjúkrahús og nógva annað lamin eftir stuttari løtu.

Tað sigur Torben Nielsen, KT-serfrøðingur, í kjalarvørrinum av álopinum av teldusníkum móti nic.fo. Tað fyrsta ógvusliga álopið á eina føroyska skipan, sum hevur ein so sentralan leiklut í føroyska KT-kervinum.

– Hesir ungu nørdar kenna hugsunarháttin og vita júst hvat kann væntast, sigur hann.

– Vit mugu verja okkum, skipa eitt slag av talgildari verju móti yvirgangi. Vit síggja hvussu gøtur verða byrgdar av við stórum betongklossum tá ein festivalur er, tí vandi er fyri yvirgangi. Men vit gera einki at verja okkum móti talgildum yvirgangi, sum í ringasta føri kann kosta fleiri mannalív og leggja samfelagið lamið, sigur Torben Nielsen.

**Fór kalt niður eftir bakinum**

Tað kom púra óvart á øll, tá nic.fo brádliga varð lagt lamið av teldusníkum. Nic.fo er ikki nakað fólk og fyritøkur vanliga gera sær far um. Tað er ein umsiting, sum bara skal vera har, og sum hevur livað sítt stilla lív. Eitt FO-ráð hevur ábyrgdina, og avgjørdi í 2016 at veita umsitingina út til felagið Trygdartøkni,sum tó einki hevði við trygdina at gera. Hvør sum stóð fyri trygdini hevur áðið ikki vilja sagt alment – um har yvirhøvur hevur verið nakað.

Teldusníkarnir kundu valt at gjørt nógv størri skaða enn teir gjørdu. Teir fingu hendur á brúkaranøvnum og loyniorðum, og gjørdu seg inn á átta skipanir, men so kom stígur í. Sníkarnir søgdu seg gera hetta til stuttleika, og at teir annars vóru úr Turkalandi.

Tað fór kalt niður eftir rygginum á fleiri KT-fólkum, sum tó vóru fyrireikaði upp á, at tað fór at henda fyrr ella seinni, tí KT-økið er so illa samskipað í Føroyum. Tað kunnu vera sterkar fyritøkur, sum hava alt sítt upp á tað turra, men tað er ikki tær ein teldusníkur leypir á í fyrsta umfari – leitað verður eftir veikasta liðinum.

Ein av hesum KT-fólkunum var Torben Nielsen, sum beinanvegin mælti til breiðari samstarv í landinum, so byrgjast kann fyri teldusníkunum.

## Talgilda verju

– Vit hava brúk fyri einum "Ráð fyri talgildari verju av Føroyum", sum við jøvnum millumbillum kann skipa fyri álopum á allar Føroyar, so vit fáa eygu á tey veiku liðini, sigur Torben Nielsen.

Og tað er júst í hesum sambandi, at hann tosar um ungu teldunørdarnar, ið sum oftast ikki ferðast milium tey fínu fólkini til pinnamatsmóttøku og tosa í akademiskum vendingum. Hesir velja eina pitsa og kola fram um, og velja heldur at sita inni við telduni enn at fara út í vanliga gerandisdagin. Tað eru tílík fólk, ið eru best fyri at fremja ógvusligu álopini, og vita hvussu tað letur seg gera. Tílík álop kunnu oftast tykja ósek, men verða tey stýrd av øðrum kann tað gerast bæði vanda- og kostnaðarmikið at vera offur.

Í sambandi við eitt tílíkt skipað álop er neyðugt, at allir partar samskifta og arbeiða saman – og tað er júst tað Torben Nielsen leitar eftir.

Í fólkatali eru vit ikki nógv meira enn ein rímiliga stór útlendsk fyritøka, sum ikki hevur eitt so torskilt KT-øki at halda skil á. Men Føroyar hava sum land eina ørgrynnu av skipanum, sum

als ikki eru í familju við hvørja aðra, sum skal verjast líka væl sum tann stóra – men meðan fyritøkan samskipar sína verju, er hon í einum samfelag sum tí føroyska smábýtt, og tískil eru vit nógva meira viðbrekin enn vit ynskja at hugsa.



*Torben Nielsen, KT-serfrøðingur*

Ein av størstu fyritøkum á okkara leiðum, A. P. Møller Mærsk, hevur 89.000 starvsfólk og eina væl útbygda KT-deild, men varð kortini fyri einum álopi, sum legði stórar partar av virkseminum lamið og kostaði felagnum milliardir av krónum. Og tá er talan hóast alt um skipanir, sum vanliga spæla saman. Í Føroyum eru vit bara væl helvtin so nógv, men skipanirnar eru nógv fleiri og ymiskar, enn tær kt-fólkini hjá A.P. Møller skuldu verja.

– Hetta ráðið burdi lønt hesum ungu fólkum at gera álopini, sum um teir vóru vanligur teldusníkar, sigur Torben Nielsen.

**Alt verður teldustýrt – og viðbrekið**

Alt meira í samfelagnum verður teldustýrt umvegis stóra og smærri skipanir.

– Vit vita ikki hvat umheimurin veit um okkum, okkara fyritøkur og borgarar, men nú vita tey í hvussu er, at tað ber til at leypa á, og so mugu vit verja okkum. Tí er eisini neyðugt at gera eina váðameting fyri alt landið, sigur Torben Nielsen.

Og samfelagið er langt frá so talgilt sum tað verður um ikki so fá ár. IoT er eitt av nýggju hugtøkunum, og stendur fyri The Internet of Things og sum á einhvønn hátt umvegis tøkni samansjóðar menniskju, dátur og útbúnað, uttan at tað er neyðugt at gera nakað.

– Hetta er næsta avbjóðingin, sum uttan trygd á hægsta stigi kann gerast hættislig, samstundis sum hon bjóðar okkum eitt hav av nýggjum møguleikum, sigur Torben Nielsen.

# Dátueftirlitið í bíðistøðu

**Tá nic.fo varð rakt av teldusníkum vísti tað seg, ateníkarnir høvdu fingið atgongd til ávísar skipanir og harvuð brúkara- og loyniorð. Dátueftirlitið vil vita, um aðrir viðkvæmir upplýsingar eisini er komnir sníkunum í hendi, men fær ikki svar**

– Vit hava ikki fingið nakra trygd fyri, at teldusníkarnir ikki hava fingið hendur á persónsviðkvæmum upplýsingum, eiheldur um nakrir tílíkir upplýsingar vóru tøkir fyri teldusníkarnar. Vit vita snøgt sagt ov lítið, sigur Eyðhild Skaalum, stjóri í Dátueftirlitinum.

Tað var sunnudagin 23. September, at nic.fo heimasíðan varð álopin av teldusníkum. Hetta er síðan, sum umsitur føroyska navnaøkið, .fo, og sum tí er av størsta týdningi fyri alt tað føroyska samskiftið á internetinum.

At byrja við ljóðaði, at teldusníkarnir ongan skaða høvdu gjørt ella fingið hendur á upplýsingum. Síðan ljóðaði, at deldusníkarnir høvdu fingið hendur á øllum teldupostadressum og loyniorðum hjá øllum brúkarum á nic.fo. Tó vóru upplýsingarnir um gjaldskort ikki raktir, sambært nic.fo, sum eisini var sera sparið við upplýsingum annars.

Tað er eisini rættiliga sparið, hvat Dátueftirlitið hevur fingið at vita. Ein høvuðsuppgáva hjá eftirlitinum er annars at hava eftirlit við, at persónsupplýsingarlógin verður fylgd, so viðkvæmir persónligur upplýsingar altíð verða vardir. Sum eitt amboð til hesa verju er ein trygdarkunngerð eisini lýst, sum er galdandi fyri allar stovnar, sum kunnu liggja inni við tílíkum upplýsingum.

Spurningurin er, um nic.fo liggur inni við so nógvum upplýsingum, at teir kunnu metast at vera viðkvæmir. Um so er, ber eisini til at spyrja, um fyritøkan hevur hildið ásetingarnar í trygdarkunngerðini. Henda kunngerð ásetir millum annað, at ein sonevnd trygdarskoðan skal gerast einaferð um árið, og at hon skal skjalfestast.

Tað skal eisini gerast ein váðameting, sambært kunngerðini, ella sum tað stendur orðað: ”Dátuábyrgdarin skal gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiðu á sannlíkindum fyri broti á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av hesum.”

Eingin vitan er heldur, um nic.fo hevur royndarkoyrt skipanina móti álopum av teldusníkum.

– Vit vita snøgt sagt ov lítið um nic.fo., sigur Eyðhild Skaalum.

Áðrenn øll vitanin er komin í hús er ilt at meta um hetta kann fáa nakrar avleiðing fyri FO-umsitingina, sum hevur ábyrgdina av nic.fo.

# Umsitarin veitti bert ráðgeving

**Felagið Trygdartøkni fekk í 2016 uppgávuna at umsita nic.fo frá FO-ráðnum – men tað hevur lítið annað enn ráðgeving til viðskiftafólk**

– Okkara uppgáva er at veita vegleiðing til viðskiftafólk, og lítið meira enn tað, sigur Guðrun Poulsen frá felagnum Trygdartøkni, sum í 2016 fekk uppgávuna at umsita fo-navnaøkið.

Tað er eisini Trygdartøkni sum svarar, tá ringt verður á telefonnummarið, sum nic.fo upplýsir seg hava á heimasíðuni.

At umsita kann merkja so nógv, og navnið Trygdartøkni kundi givið ábendingar um, at felagið fyrst og fremst tók sær av KT-trygd. Men felagið hevði so einki við trygdina av nic.fo at gera.

Guðrun Poulsen sigur, at hon ikki kann úttala seg um, hvør tað so var, sum stóð fyri trygdini av nic.fo, sum annars reint fysiskt hevur verið hýst í einum ambætara á Elektron. Tað hevur sjálvsagt skapt eina fysiska verju, men ikki nakað meira enn tað.